# Nýggi risin í føroyskum vinnulívi

**Tað verður Poul Hansen, advokatur, sum í fleiri ár hevur fingist við skiparakstur, ið verður nevndarformaður í partafelagnum, sum hevur keypt seks skip og fimm fiskavirkir, sum Faroe Seafood-samtakið átti. Stjórar eru Anfinnur Olsen og Jógvan Dávid Jacobsen**

Vilmund Jacobsen



*Poul Hansen er nevndarformaður í partafelagnum, sum nú eigur og fer at reka trý fiskafiski og seks ísfiskatrolarar*

Mánadagin í vikuni varð sáttmáli undirskrivaður millum partafelagið, sum kallast 16. februar 2011 og trotabúgvini eftir Faroe Seafood og Faroe Fish II. Avtalan snýr seg um tey fýra fiskavirkini í Runavík, Toftum, Vestmanna og Vági – og tey seks skipini, Bak, Stelk, Heyk, Falk, Rók og Lerk.

Tað eru trý feløg, ið hava stovnað partafelagið, sum nú eigur hesar ognir. Tey eru Bacalao í Havn, har Poul Hansen, sum nú er nevndarformaður, hevur sítt tilknýti. Poul er sonur Aksel Hansen, sum í mong ár fekst við skiparakstur, og sjálvur hevur Poul eisini fingist við skiparakstur í fleiri ár.

Hini feløgini, Varðin í Gøtu og Framjerji á Toftum, eru tey, sum hava verið á bananum sum møguligir keyparar av Faroe Seafood heilt síðan byrjan. Varðin eigur uppisjóvarskipini, Trónd í Gøtu, Finn Fríða, Jupiter og Saksaberg – og Framherji eigur uppisjóvarskipið Fagraberg og flakatrolaran, Vesturvón.

## Ein vinnulívsrisi

Felagið, sum er stovnað og sum nú eigur hesar ognir, er størsti risi í føroyskum vinnulívi, tó at hann enn er væl minni, enn stóra samtakið Faroe Seafood var.

Í fyrsta lagi átti Faroe Seafood-samtakið fleiri virkir, enn nýggja felagið eigur. Umframt tey virkir, sum nýggja felagið hevur keypt, átti Faroe Seafood eisini fiskavirkið í Havn, sum var í gongd, til samtakið endaði í skiftirættinum. Haraftrat átti felagið fiskavirkið í Miðvági og fiskavirkið á Tvøroyri, sum eftirhondini hava ligið still leingi.

Faroe Seafood átti eisini tveir triðingar í partrolarunum, Jaspis og Ametyst og helmingin í djúpvatnstrolaranum, Ednu. Haraftrat átti felagið landingarmiðstøðina Kongshavn í Saltangará og lut í øðrum ognum, eitt nú triðingin í felagnum Salm Pro, sum er laksavirkið í Fuglafirði, ið tó hevur ligið stilt síðan fjør heyst.

Tað skerst tó ikki burtur, at nýggi fiskivinnurisin í føroyskum vinnulívi er rættiliga stórur eftir føroyskum mátistokki.

## Felagið skipað

Umframt Poul Hansen, sum nú er nevndarformaður, eru hini í nevndini: Torsteinn Már Baldvinsson, stjóri í Samherja í Íslandi, Elisabeth Ditleifsdóttir Eldevig Olsen og Tummas Thomsen í Gøtu.

Elisabeth er kona Anfinn Olsen og eigur eins eins og maðurin ein triðing í Framherja, og síðan er tað Tummas Thomsen, sum í nevndini umboðar partin hjá Varðanum í Gøtu.

Stjórar í nýggja felagnum, sum nú fer at reka skip og virkir, eru Anfinnur Olsen og Jógvan Dávid Jacobsen, sum umboða ávikavist Framherja og Varðan.

Partapeningurin í 16. februar 2011 er 50 miljónir krónur og er goldin kontant til kurs 100.



*Elisabeth og Anfinnur eru hjún. Tey eiga tveir triðingar av Framherja. Hon er í nevndini í nýggja samtakinum, og hann er stjóri í felagnum saman við Jógvani Dávid Jacobsen*



# Væntandi l skipini í he

**Anfinnur Olsen, stjóri, er bjartskygdur og væntar, at tey fyrstu tvey pørini loysa longu í dag – og tá vikan fer at halla, væntar hann, at øll seks skipini eru farin til fiskiskap**

Vilmund Jacobsen

Gongst, sum ætlað hjá nýggja felagnum, sum nú eigur fýra fiskavirki og seks ísfiskatrolarar, so loysa tvey av pørunum, áðrenn dagurin í dag er lokin.

Tað eru Bakur og Stelkur og Heykur og Falkur.

Anfinnur Olsen, stjóri í nýggja samtakinum, sigur, at manning er fingin til øll skipini, og hetta er í stóran mun sama manning, sum var við skipunum undir gomlu eigarunum.

- Vit hava fingið fatur á øllum skiparunum aftur, eins og yvirmenninir í aðrar mátar at kalla eru teir somu. Sama er við manningini. Onkur einstakur maður hevur fingið annan kjans og er farin við øðrum skipi.

Stjórin í nýggja samtakinum sigur, at Rókur og Lerkur, sum eru triðja parið, væntandi eisini loysa, áðrenn hendan vikan er úti.

- Rókur, sum partrolar saman við Lerki, fekk eina umvæling, meðan gomlu